VIÐMERKINGAR

Gud hevur aldri sett prestar og klokkarar í samkomu sína, hetta er alt menniskjaverk í láturligum klovnadraktum! Eingin av hesum láturligu og avskeplaðu tænastum finnast í orðinum. Sum Jóhannes doyparin kundi vísa á: Mín tænasta er at finna hjá Esaias profeti 40:3. Soleiðis kunnu eisini allar tænastur í samkomuni peika á sín nýtestamentliga uppruna.

Jesus var sjálvur seinasti prestur av gamla testamenti, eins og Hann eisini var fyrsti og einasti prestur av sínum slag í nýggja testamenti. Tí í Honum eru øll tey, ið endurfødd eru av Anda Guds, fødd inn í eina heilaga kongaliga prestaætt.

Tað er sostatt líkamikið um okkara nútíðar kirkjur eru fullsettar við mannligum ella kvinnuligum prestum – við ella uttan reyðar sokkar. Hesir hava onga ávirkna á veruligu samkomu Kristusar, – men kunnu bert hava eina ávísa ávirkan á versligu samfelags sjónarmiðini. Sum skriftin eisini sigur: »Tað náttúrliga menniskjað tekur ikki við tí andaliga«. Soleiðis eru, á sama hátt, enn í dag nøkur, ið ikki taka við tí skøkjan, samstarvsfelagar og ørindasveinar hennara borðreiða við. Hesi eru tey, ið hava hoyrt orð Andans: »Komið út frá henni«! Og tey fylgja lambinum har tað gongur.

Lat meg geva tær, ið lesur, hesa staðiligu áheitan: Tak einki frá og legg einki til Guds orð – lat heldur ongan gera tað fyri teg!

Nú eri eg væl vitandi um, at tað, ið eg her skrivi, ikki fellur øllum væl fyri brósti. Hóast tað, so skrivi eg hesa rættleiðing og áminning fyri teirra útvaldu skuld, teirra – ið eru ætlað til at arva frelsu. Tað er til tín, ið ikki trívist í órættvísini lygnini hesi orð verða skrivað.

# Høgni Hoydal og moralurin

**Finnur Helmsdal,**
*tingmaður*



*Finnur Helmsdal tingmaður Tjóðveldisfloksins, í hvussu er inntil næsta floksting*

Eykaflokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum 18. desember fekk staðfest, at eitt ávíst mark skal vera fyri atburðinum hjá limum floksins. Sum onkur tók til, so skal eitt minsta mark vera fyri andstendigheitini í flokkinum. Onnur søgdu, at ein limur skal kunna kenna seg tryggan innanhýsis í Tjóðveldisflokkinum, soleiðis at ein ikki skal rokna við at verða álopin verjuleysur mitt á nátt av floksfeløgum. Og annars varð nógv røtt um tað at vísa hvørjum øðrum virðing. Ja, alt sovorði, sum vanliga verður mett sum ein sjálvfylgja í øllum lívsins viðurskiftum.

Formaður floksins, Høgni Hoydal, hevði sjálvur drigið mál um ærumeiðing gjøgnum tríggjar langar mánaðar, bara fyri at fáa ærumeiðaran Tórbjørn Jacobsen plaffaðan niður av flokstinginum. Hetta valdi formaðurin heldur enn at taka stig til eina loysn, sum fyri tað mesta fór at fyribyrgja, at Tjóðveldisflokkurin fór at fáa álvarsligan løst. Men formaðurin valdi at lata hildarleikin fara fram alment. Heldur enn at finna loysnina, so ella so innanhýsis, so setti hann flokkin í veð. Bert fyri at fáa nøkur persónlig viðurskifti upp á pláss.

Høgni Hoydal hevur í nakrar vikur ynskt Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum, og eydnaðist hetta honum til fulnar leygardagin. Við góðari hjálp frá trúgvum partísoldatum, fekk hann smíðað eina yvirlýsing frá tinginum, sum gjørdi tað ómøguliga møguligt. Hóast tað ikki kundi bera til at ekskludera Tórbjørn leygardagin, so fann Høgni Hoydal snildisliga ein hátt at gera tað upp á allíkavæl. Høgni hevur alla tíðina sagt, at hann ætlaði ikki, at flokstingið skuldi avhøvda Tórbjørn, men tá til stykkis kom, so hendi tað allíkavæl. Helst sum formaðurin hevði ætlað frá byrjan. Jólafriður ella ei, avrættingin skuldi staðfestast, meðan øsingin var í hásæti.

## Kammurátur Magnussen

Flokstingið varð hildið leygardagin av eini einasti orsøk. Tí Høgni var persónliga ærumeiddur vegna grov og ófantalig særdur av brøvunum frá Torbjørn. Høgni Hoydal segði orðarætt á flokstinginum, at tað kann ikki góðtakast, at ein limur í Tjóðveldisflokkinum leypir á, niðurgerð og ærumeiðir annan lim alment, og at flokkurin mátti hava løgfrøðisligar ásetingar um, hvat gerast skal í slíkum førum. Hetta fekk Høgni, og Tórbjørn er nú fyrrverandi tjóðveldistingmaður.

Undirritaði var ein av teimum heilt fáu, sum loyvdi sær at røða kritiskt móti uppskotinum um útblakingargreinina. Mælti til, at flokstingið heitti á tingmanningina um at greiða fløkjuna, og annars taka alt floksvirksemið til viðgerðar, eisini arbeiðsháttin hjá formanninum.

Síðan tók Ragnar Magnussen orðið. Hann kom inn í flokkin fyri nøkrum árum síðan. Royndi seg fyrst sum valevni, síðan bleiv hann nevndarlimur í Suðurstreymoyar tjóðveldisfelag. Hann helt eina røðu, sum snúði seg um mín persón, og bert um mín persón. Hon var minst líka grov og áleypandi, sum tað Tórbjørn skrivaði um Høgna Hoydal. Hann legði ikki fingrarnar ímillum, og legði meg millum annað undir ikki at møta upp til fundar. Ragnar Magnussen veit, at eg havi møtt so væl sum nakar, inntil 2002, og hann veit eisini, hví eg ikki havi verið á so nógvum fundum síðan. Ragnar Magnussen segði, at eg møtti leygardagin, tí nú luktaði eg blóð (hann hevði eisini insinuerað í røðuni, at tað er bara kríggj og ballada, har eg eri). Men eg var satt at siga, millum teir heilt fáu, sum ikki luktaði blóð leygardagin á Frælsinum. Ikki eiti á óndsinni, men soleiðis fer ein fram, tá einum fattast fakliga. Fríggjadagin las maðurin helst jólaevangeliið fyri teimum smáu inni í Kaldbak, leygardagin varð halgabók skift út við blóðdálkaða svørðið. Tað er kanska líka mikið hvørji -ismu ein virkar eftir, bert hon hóskar til høvið og fremur sakina. Einaferð partísoldatur, altíð undirgivin og treytaleysur partísoldatur.

## Øll ikki líka fyri Høgna

Síðan tók floksformaðurin orðið. At røða dugir hann sum fáur, og hann prógvaði eisini til fulnar, at evnini at snara orð hjá øðrum eru intakt. Snildisliga beindi hann mínar atfinningar móti honum víðari soleiðis, at eg brádliga stóð sum áleypari á fótfólk floksins. Hann fekk hegnisliga flutt sín egna persón úr ljósinum eina løtu, hann setti meg nú upp móti teimum, sum dagliga stríðast fyri flokkin. Vit hava sanniliga ein snildan formann, sum altíð sleppur sær undan at verða viðgjørdur. Høgni Hoydal er einfalt ikki til diskussión.

Høgni tosaði nógv um tað neyðuga í at hava virðing, hvør fyri øðrum, men Ragnar Magnussen fekk ikki so mikið sum eina átalu fyri kanska grovasta álop á nakran tingmann í Tjóðveldisflokkinum. Formaðurin, sum so fegin vil hækka moralin í Tjóðveldisflokkinum, hann læt hetta bert fara aftur við borðinum. Men tað er júst Høgni Hoydal, tá hann er bestur. Tað snýr seg ikki um, hvat hansara verjar gera, teir kunnu gera tað, teimum lystir. Men váðar ein av kritikarunum sær so mikið sum at opna gákin, ja, so skal alt floksapparatið aktiverast. So skal viðkomandi leiðast til dóms og tað, sum kanska verri er. Nei, í Tjóðveldisflokkinum er nú nakað síðan, at øll vóru líka fyri Høgna Hoydal.

Ímynda vit okkum eina løtu, at Ragnar Magnussen segði somu orð um Høgna Hoydal ella onkran av hansara, sum hann segði um meg. Hvør hevði avleiðingin tá verið fyri Ragnar? Sjálvandi hevði hann prompté mist øll álitisstørv í flokkinum.

Formaðurin hoyrdi hvørt orð, Ragnar segði á flokstinginum. Men tey eru eftir øllum at døma ikki í stríð við moralsku linju formansins. Tey vóru helst anstendig nokk og merkt av virðing fyri mínum persóni, og tey verða helst heldur ikki tulkað sum álop av grovasta og fúlasta slag á tingmann í almennum umhvørvi. Nei, tí hatta er í samsvari við moralin hjá Høgna Hoydal. Sov tú bara víðari Ragnar, tí tær hendir einki, og har hendir helst heldur einki, har tú er. Eg hevði tíni orð uppiborið, tí eg eri ikki so lýðin, sum tit eru. Men vit kunnu bara staðfesta, at vit vanligu skulu finna okkum í slíkum, sum formaðurin ikki ger.

Annars var tað ræðandi at síggja og hoyra nakrar, sum sótu undir inngongdini úti í Læraraskúlaauluni. Sekteriskir yvirtónar og sáblaskróvan. Er tað frelst frælsi í takt, sum nú skal á skrá?

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!